# Almanna- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 6. feb. 2024 |
| Mál nr.: | 23/11840-8 |
| Málsviðgjørt: | HP |
| Ummælistíð: | 6. feb. 2024 / 27. feb. 2024 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.**
(Markið fyri inntøku, ið verður skattað eftir kapitalvinningsskattalógini, verður hækkað o.a.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 um viðbót til ávísar pensjónistar, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í heitinum verður "v.fl." strikað.

**2.** Í § 3, stk. 2 verður "kr. 2.000" broytt til: "kr. 12.600"

**3.** Aftan á § 3, stk. 2 verður sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 3.* Upphæddin í stk. 2 verður javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar. Javnaða upphæddin verður lýst í kunngerð um áseting og javning av almannaveitingum."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Tað er ein treyt fyri at fáa rætt til *Viðbót til ávísar pensjónistar*, at virði av nettoinntøku, ið verður skattað eftir reglunum í kapitalvinningsskattalógini, ikki er hægri enn 2.000 kr. Upphæddin, ið pensjónisturin missir rættin til, er 8.160 kr. um árið (upphædd í 2024). Tað merkir, at ein pensjónistur kann koma út fyri at hava undirskot av at fáa eina inntøku.

Seinastu árini hava óvanliga nógvir pensjónistar fingið eftirrokning í sambandi við viðbót til ávísar pensjónistar. Talan er m.a. um pensjónistar, sum ikki hava aðrar inntøkur av týdningi, men sum eiga partabrøv í peningastovni fyri lutfalsliga smáar upphæddir. Hevur pensjónisturin fingið vinningsbýti á t.d. 3.000 kr., samstundis sum hann hevur móttikið viðbót til ávísar pensjónistar, verður hann kravdur eftir at afturrinda brennistuðulin fyri eitt heilt ár.

Tað verður ikki mett at vera hóskandi, at upphæddin, sum pensjónisturin missir, er hægri enn tað, sum hann fær.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Veitingin *viðbót til ávísar pensjónistar* verður í mannamunni ofta nevnt *brennistuðul*. Brennistuðul stavar frá gamlari tíð, tá veitingin hevði til endamáls at vera ein stuðul til oljugjald. Seinni broyttist endamálið til at fevna um stuðul til olju-, sjónvarps- og útvarpsgjald. Síðani 1995 hevur heitið sambært lógini verið viðbót til ávísar pensjónistar, og endamálið hevur verið at veita at fíggjarligt ískoyti til pensjónistar við lágum inntøkum. Tó verður veitingin enn nevnd brennistuðul.

Rætt til viðbót til ávísar pensjónistar hava fólkapensjónistar, ið eru føddir áðrenn 1953, og fyritíðarpensjónistar. Fólkapensjónistar, sum hoyra til sokallaðu pensjónsnýskipanina, hava ikki rætt til veitingina. Í staðin er vanliga fólkapensjónin hjá hesum pensjónistum, hægri. Inntøkan aftan á skatt og gjøld hjá pensjónistum í ávikavist gomlu- og nýggju pensjónsskipanini er so at siga tann sama.

Treytin fyri at fáa rætt til viðbót til ávísar pensjónistar er, at ógiftur pensjónistur ikki hevur hægri inntøkugrundarlag enn 60.000 kr. um árið. Eini hjún kunnu í mesta lagi hava inntøkugrundarlag upp á 80.000 kr. tilsamans fyri at fáa rætt til veitingina. Inntøkugrundarlag er árlig skattskyldug inntøka, undantikið almannapensjón og gjald frá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Til inntøkugrundarlagið hoyrir sostatt arbeiðsløn, kapitalinntøkur, lutapensjón, lívrenta o.a. Harumframt er tað ein treyt fyri at fáa rætt til veitingina, at virði av nettoinntøku, ið verður skattað eftir reglunum í kapitalvinningsskattalógini, ikki er hægri enn 2.000 kr.

Viðbót til ávísar pensjónistar er 8.160 kr. um árið (í 2024), svarandi til eina mánaðarliga upphædd upp á 680 kr. Veitingin er skattafrí. Um inntøkugrundarlagið er hægri enn 60.000 kr. (80.000 kr. hjá hjúnum), ella um virðið av kapitalinntøku er hægri enn 2.000 kr., dettur øll viðbótin burtur. Giftir pensjónistar fáa eina upphædd í felag, sum verður útgoldin við einari helvt til hvønn.

Tá tað í sambandi við kapitalinntøkur er ásett "virði av nettoinntøku", merkir tað vinningur og tap tilsamans, áðrenn skattur er goldin. Ein pensjónistur, ið fær eitt vinngingsbýti á t.d. 2.500

kr., hevur 1.625 kr. eftir, tá skatturin er drigin frá (persónur rindar 35% í skatt av kapitalvinningi). Hesin pensjónisturin hevur ikki rætt til viðbót til ávísar pensjónistar, tí nettovirðið av kapitalinntøkum er hægri enn 2.000 kr.

Ásetingin um markið fyri kapitalinntøkur varð sett inn í løgtingslógina við løgtingslóg nr. 189 frá 21. desember 2018, sum kom gildi 1. januar 2019. Áðrenn 2019 vóru kapitalinntøkur partur av vanligu treytunum um inntøkugrundarlag. Upphæddin upp á 2.000 kr. er ikki fevnd av reglunum um javning, og upphæddin hevur sostatt verið óbroytt síðani 2019.

Endamálið við broytingini í 2019 var at málrætta viðbót til ávísar pensjónistar til tey, sum vóru ringast fyri fíggjarliga. Ein grundgeving fyri at broyta løgtingslógina var, at tað eru pensjónistar, sum fáa viðbót til ávísar pensjónistar, sum hava stórar upphæddir innistandandi, sum eisini gevur rentuinntøkur.

Ásetingin fevnir um allar inntøkur, ið verða skattaðar eftir kapitialvinningsskattalógini – t.e. ikki bara rentuinntøkur av innistandandi. Broytingin hevur havt við sær, pensjónistar, sum fáa útgoldið vinningsbýti, missa rættin til viðbót til ávísar pensjónistar í árinum, tá vinningsbýtið verður útgoldið.

*Heitið á løgtingslógini*
Heitið á løgtingslógini er Viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. V.fl. er ein stytting fyri "við fleiri". Áðrenn 2013 hevði persónur, ið fekk varandi veiting sambært tágaldandi forsorgarlógini, eisini rætt til viðbót til ávísar pensjónistar. Síðani 2013 eru einans pensjónistar, ið hava rætt til veiting sambært løgtingslógini, og v.fl. eigur tí at strikast úr heitinum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Í higartil galdandi skipan kann tað koma fyri, at pensjónistur hevur undirskot av einum kapitalvinningi. Treytin at fáa rætt til viðbót til ávísar pensjónistar er í galdandi skipan, at pensjónistur í mesta lagi hevur inntøku upp á 2.000 kr., ið verður skattað eftir kapitalvinningsskattalógini. Hetta markið hækkar til 12.600 kr. Endamálið er at fyribyrgja, at pensjónistur ikki skal missa meira pening, enn hann fær í kapitalvinningi.

Tað eru nógvir pensjónistar, sum eiga partabrøv fyri nakrar túsund krónur, sum síðstu árini hava fingið útgoldið serligt vinningsbýti, ið er hægri enn 2.000 kr. Fleiri av hesum pensjónistum eru kravdir eftir at afturrinda viðbót til ávísar pensjónistar fyri eitt heilt ár, ið er ein størri upphædd tað, sum tey hava fingið útgoldið í vinningsbýti.

Skattaprosentið í sambandi við kapitalvinning hjá privatpersóni er 35 %. Ein persónur, ið hevur kapitalvinning upp á 12.600 kr., hevur sostatt 8.190 kr. eftir, tá skatturin er goldin. Viðbót til ávísar pensjónistar er ein skattafrí veiting, sum í 2024 er 8.160 kr.

Viðbót til ávísar pensjónistar verður javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar. Við hesum uppskotinum verður markið á 12.600 kr. eisini javnað, og sostatt verður tað eisini komandi árini galdandi, at pensjónisturin ikki fer at missa meira enn hann fær. Sambært uppskotinum kemur broytingin í gildi 1. januar 2024, og báðar upphæddirnar verða sostatt javnaðar í 2025.

*Teknisk broyting*
Síðani 2013 hava tað einans verið pensjónistar, ið hava havt rætt til viðbót til ávísar pensjónistar, og styttingin "v.fl." verður tískil strikað í heitinum á løgtingslógini.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Markið fyri kapitalvinningi fyri at hava rætt til viðbót til ávísar pensjónistar hækkar úr 2.000 kr. upp til 12.600 kr.

Eisini verður heitið á løgtingslógini tillagað soleiðis, at tað verður í samsvar við innihaldið í lógini.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur ligið til almenna hoyring á hoyringsportalinum hjá Føroya landsstýri.

Harumframt hava hesi havt uppskotið til hoyringar:

Almannaverkið
Fíggjarmálaráðið
Landsfelag pensjónista
MEGD
TAKS
Vinnuhúsið

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Fleiri pensjónistar fara at fáa rætt til viðbót til ávísar pensjónistar, og tí hevur uppskotið við sær, at útreiðslur landskassans fara at hækka. Tað ber tó ikki til at meta neyvt um fíggjarligu avleiðingarnar.

Fleiri pensjónistar hava síðstu trý árini havt kapitalvinning, ið er hægri enn treytin fyri at fáa viðbót til ávísar pensjónistar.

**Pensjónistar, ið hava nettoinntøkur millum 2.000 og 12.600 kr., ið verða skattaðar eftir kapitialvinningsskattalógini árini 2019-2022**

| | ***2019*** | *2020* | *2021* | *2022* |
|---|---|---|---|---|
| *Fólkapensjónistar* | 149 | 65 | 493 | 467 |
| *Fyritíðarpensjónistar* | 12 | 4 | 50 | 47 |
| ***Tilsamans*** | **161** | **69** | **543** | **514** |

Talvan omanfyri vísir talið av pensjónistum, ið høvdu nettoinntøkur, sum verða skattaðar eftir kapitalvinningsskattalógini millum 2.000 og 12.600 kr. Tølini fyri 2023 eru ikki tøk enn.

Allir hesir pensjónistar í talvuni omanfyri høvdu tó ikki fingið rætt til viðbót til ávísar pensjónistar, hóast markið hesi árini hevði verið 12.600 kr. Av teimum 514 pensjónistunum, sum í 2022 høvdu kapitalinntøkur millum 2.000 og 12.600 kr., vóru umleið 140, sum høvdu somikið høgt inntøkugrundarlag (aðrar inntøkur), at tey ikki lúka treytirnar fyri at fáa rætt til viðbót til ávísar pensjónistar. Harumframt eru tað umleið 250 av pensjónistunum í 2022, sum eru giftir, har inntøkugrundarlagið hjá hjúnafelaganum ikki er kent. Sannlíkt eru nakrir hjúnafelagar, ið hava arbeiðsinntøku ella hava aðrar pensjónsinntøkur, sum merkir, at tey ikki hava rætt til viðbót til ávísar pensjónistar.

Um so er, at pensjónistar komandi árini ikki fáa útlutað serstakt vinningsbýti, væntast talið av pensjónistum við kapitalinntøkum millum 2.000 kr. og 12.600 kr. at fara at nærkast tølunum áðrenn 2021. Tó er rentustøðið hækkað, og tað er við til at økja um talið av pensjónistum, sum hava kapitalinntøkur hægri enn 2.000 kr.

Eisini skal havast í huga, at tað eru bara fólkapensjónistar, ið hoyra til gomlu pensjónsskipanina, ið hava rætt til viðbót til ávísar pensjónistar (umframt fyritíðarpensjónistar), og tað merkir, at talið av veitingum fer at lækka komandi árini. Umleið 80 % av játtanini til viðbót til ávísar pensjónistar, sum í 2024 er 32.648 tús. kr., fer til fólkapensjónistar.

Viðbót til ávísar pensjónistar er 8.160 kr. um árið. Um uppskotið fer at hava við sær, at 100 pensjónistar fleiri fara at fáa viðbót til ávísar pensjónistar, so økjast útreiðslur landskassans við umleið 800 tús. kr. og tvífalt, um talið verður 200. Hvussu rentugongdin verður, ella í hvønn mun pensjónistar fara at fáa serstakt vinningsbýti, er tó ilt at meta um.

Viðbót til ávísar pensjónistar er ein skattafrí veiting, og uppskotið hevur sostatt ikki við sær avleiðingar fyri skattainntøkur hjá kommununum.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur við sær jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri teir pensjónistar, ið hava kapitalvinning frá 2.000 og upp til 12.600 kr., og sum annars ikki hava inntøkugrundarlag hægri enn 60.000 ella 80.000 kr. (ávikavist ógift og gift). Hesi fara at fáa rætt til viðbót til ávísar pensjónistar, sum er 680 kr. um mánaðin. Hjún hava rætt til eina viðbót í felag, sum verður útgoldin við einari helvt í part (t.v.s. 340 kr. um mánaðin í part).

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri skyldur Føroya sambært Hoyvíkssáttmálanum, Evropeiska mannarættindasáttmálanum ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
*Til nr. 1*
"V.fl." verður strikað úr heitinum. Síðani 2013 hava tað bara verið pensjónistar, ið hava havt rætt til veiting sambært løgtingslógini. Áðrenn 2013 høvdu persónar, ið fingu varandi veiting sambært tágaldandi forsorgarlógini, eisini rætt til veitingina. At v.fl. verður strikað í heitinum hevur ikki annað endamál enn, at heitið verður í samsvar við innihaldið í løgtingslógini.

*Til nr. 2*
Í higartil galdandi lóg hevur pensjónistur, sum hevur nettoinntøku hægri enn 2.000 kr., ið verður skattað eftir kapitalvinningsskattalógini, ikki rætt til viðbót til ávísar pensjónistar. Hetta markið hækkar til 12.600 kr. Broytingin hevur ikki við sær broytingar annars í umsitingini av ásetingini.

*Til nr. 3*
Markið upp á 12.600 verður javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar. Javnaða upphæddin verður lýst í kunngerð um áseting og javning av almannaveitingum.

Høvuðsendamálið við uppskotinum er at fyribyrgja, at tað, sum ein pensjónistur missir í veiting frá tí almenna, ikki er meira enn tað, sum inntøka hansara er. Viðbót til ávísar pensjónistar er fevnt av vanligu javningarreglunum fyri almannaveitingar. Við at markið um inntøkur, ið verða skattaðar eftir kapitalvinningsskattalógini, eisini verður javnað, verður hildið fast um prinsippið um, at pensjónisturin ikki skal missa meira enn enn fær.

Uppskotið er ásett at koma í gildi 1. januar 2024, og upphæddin upp á 12.600 kr. er tí galdandi í 2024. Sostatt verður upphæddin javnað fyrstu ferð við gildiskomu 1. januar 2025.

**Til § 2**
Uppskotið kemur í gildi 1. januar 2024. Tað merkir, at broytingin kemur at hava afturvirkandi virknað. Eftirrokning av viðbót til ávísar pensjónistar fer fram, tá árið er farið afturum. Tað merkir, at eftirrokning fyri árið 2024 fer fram í 2025. Pensjónistar, sum av órøttum ikki hava fingið viðbót til ávísar pensjónistar í 2024, fáa alla upphæddina útgoldna í sambandi við eftirrokningina í 2025. Øvugt er hjá teimum, sum av órøttum hava fingið viðbót til ávísar pensjónistar í 2024. Hesir verða kravdir eftir útgoldnu veitingini í 2025.

Almanna- og mentamálaráðið, dagfesting.

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur